# Ein heilsan til pápa mín, Pollaba, ið fyllir 90 ár 23. juli 2006



Góði pápi. Nú tú fyllir níti ár, vil eg senda tær henda sálm sum eina heilsu til tín. Tú hevur nú livað eitt langt lív, og eg takki Guði, fyri at Hann hevur givið mær loyvi at átt ein pápa sum teg í so mong ár.

Títt lív hevur verið á sjónum, og kann eg minnast sum smágenta, at tá tú vart heima um summarið, plagdi tú at fara við okkum við árabáti at dyrgja. Tað var hugnaligt. Og hvørja ferð tú vart á veg heim av einum langum túri, stákaðist mamma og gjørdi alt so hugnaligt, tí nú kom pápi heim.

Tíðin flýgur avstað, árini eru nú mong, og ert tú nú á Røktarheimi. Ofta sigur tú, tá vit eru og vitja teg »forbi er nu barndommes dage, og jeg ejer kun minder tilbage« Tað kunnu vit sanniliga siga um teg. Vit eiga bara góð minni um teg og mammu við, sum ikki er millum okkum meira. Tín trúgv og títt lív hevur verið fyrimyndarligt. Altíð við tí góða og altíð takksamur, og hvørja ferð tú hevur fingið eina hjálpandi hon av starvsfólkunum, nevnir tú tey fyri »perlur«.

Góði pápi, tú og vit eru ríkiliga vælsignað. Tú eigur fýra børn, 16 abbabørn og 18 langabbabørn og hava tey eisini nógv gott at minnast um teirra abbalang.

Vit gleða okkum at verða saman við tær sunnudagin, og ynskja at Harrin framvegis ríkiliga skal vælsigna teg.

Tær bestu heilsur frá døttur tíni.

**Elsa**

*Í barnaárum lívið blómar*
*Og verðin smílir, lær og ljómar.*
*Í sjónarringi andin hómar*
*Í trúgv eitt himmalskt land, sum barnahjarta nam.*

*Himmalska lyftisland, teg barnatrúgvin fann,*
*Tú ungdómshjarta vann, - tí har býr Jesus*
*Ja, ungdómsár og síðan gráu hár*
*Meg minna um eitt ævigt himmalskt vár!*

*Í ungdómsárum birtast dreymar,*
*Í loyndum kvekjast kenslur eymar,*
*Og vónin, sum í brósti streymar,*
*So tráandi í trúgv móti himmalhæddum ber.*

*Í manndómsárum tíðin trýtur,*
*Og stúran stundum hjarta nítur,*
*Men gjøngum alt seg trúgvin brýtur*
*Og festir eyga aftur lyftislandið á.*

*Í ellisárum minkar megin,*
*Og mangt kann dimma trúðarvegin,*
*Tó altíð floymir himmalgleðin,*
*Í hjarta inn, tá trúgvin lyftislandið sær.*

## Sveinbjørn Kvilt av Skála farin 83 ára gamal

Sveinbjørn var av Eiði, sonur Thominu, f. Andreassen, og Hans Jacob Poulsen, sum var fyrsti løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin í Eysturoynni.

Pápin, ið eisini var fiskimaður, doyði, meðan børnini vóru smá, bert 43 ára gamal, og mamman sat eftir við 6 børnum. Tey eru: Margretha Sigurðsson, Poul Engberg Poulsen, Sveinbjørn Kvilt, Tórhallur Kollsker, Alfred Poulsen og Ásmundur Poulsen. Av teimum eru Alfred og Ásmundur eftir á lívi.

Sveinbjørn giftist við Katrin, dóttir Kristionnu, f. Hansen, og Johan Kallsoy, lærara og løgtingsmann, eisini av Eiði, og settu tey búgv á Skála.

Sveinbjørn og Katrin eiga 4 børn, Tórhild, sum býr í Havn, Elinborg og Trúgvi, sum búgva í Danmark, og Jórun, sum býr í Runavik.

Sum ungur fór Sveinbjørn til skips, og sigldi hann eisini nógv undir krígnum. Seinni sigldi hann nógv ár við norðmonnum. Tey síðstu mongu árini arbeiddi hann á Skála Skipasmiðju á planloftinum. Sveinbjørn var góður til hendurnar og bygdi t.d. beiggjanum Poul Engberg ein speedbát. Eisini høvdu tey kafé á Skála, har konan hevur frísørsalong.

Sveinbjørn var væl vitandi maður, las nógv, og hevði sínar avgjørdu meiningar um ymisk samfelagsviðurskifti.

Jarðarferðin verður úr Skála kirkju leygardagin tann 22. juli kl.13.00.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum veittu hjálp og sýndu samkenslu,
tá okkara kæri pápi, verpápi, abbi, langabbi og beiggi

**Malvinus Joensen**
Klaksvík

andaðist og fór til gravar, takka vit hjartaliga.

Takk til Dupultkvartettina í Ebenezer fyri vakran sang,
takk fyri troystarrík orð í kapellinum og í Betesda,
og takk fyri gávur til Zarepta.

*Familjunnar vegna*
**Marjun, Súsanna, Katrin, Bjarni og Davis**

## Dagarnir

**Leygardagin**
Maria Magdalena. Verður nvnd sum ein av teimum kvinnunum, sum vóru í fylgi við Jesusi og verður sett í samband við ymiskar kvinnur, sum vit annars hoyra um í evangelisku frásøgunum. Var ein av kvinninum við Jesu grøv, tá ið hann var upprisin. Magdalena merkir úr bygdini Magdala.

**Sunnudagin**
Appolonaris. Sigst at hava verið ferðafelagið hjá ápostlinum Pæturi og varð av honum sendur til Ravenna í Italiu sum trúboðari. Har gjørdist hann fyrsti biskupurin, men varð fyribeindur umleiðs ár 75 av uppøstum heidningum.

**Mánadagin**
Kristin. Eftir halgisøguni er talan um eina ellivu ára gamla gentu, sum verður tikin av døgum, av tí at hon breyt nakrar skurðgudamyndir og gav teimum fátøku gullið og tað dýra tilfarið, tær vóru gjørdar av. Annars hava tvær halgar kvinnur 24. juli sum minningardag. Sankta Kristina úr Týrus og Sankta Kristina úr Bolsena.

## Tøkk

Eina hjartans tøkk senda vit tykkum øllum,
ið sýndu samkenslu og á annan hátt hjálptu til,
tá ið okkara elskaði pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Zacharias Müller**
Porkeri

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til familju og vinir, ið hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk til Hilmar Bech, prestarnar Jónsvein Bech
og Ólavur Rasmussen fyri troystarrík orð
í kapellinum og kirkjuni.
Tøkk fyri heilsanir, blómur, kransar og peningagávur
til Missiónshúsið.
Tøkk til sangarar og kirkjutænarar.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.
Harrin signi tykkum øll.

*Familjunnar vegna*
**Sonja, Elna, Daniel Jacob og Signa**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymsan hátt mintust til mín á áttati ára degnum, takki eg so hjartaliga.

**Birgit Hestoy**
**Tvøroyri**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og
hjálpsemi, tá kæri bróður, svágur, pápabeiggi
og abbabeiggi okkara

**Jákup Andreasen**
Øravíkarlíð

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til Heimarøktina og tykkum á
Landssjúkrahúsinum.
Tøkk til Sonju Klein og Jónsvein Bech, prestar,
fyri troystarrík orð.
Tøkk til sangarar, kirkjutænarar, berarar og gravara.
Tøkk fyri uppringingar, blómur, kransar, gávur og tit øll,
ið hjálptu til á annan hátt til jarðarferðina og ervið.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Kaj, Rhonda, Niels John, Bergur og Óli**

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við